# Fannakavi og fran



*hóast broyttan stíl, so hómast enn gamli og rótfesti stílurin við Henning og Jens Tummas. Teirra grundfesta swing er ikki at fara skeivur av*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Annað undanumfar av Prix Føroyar kappingini 2005 fór av bakkastokki í Mentanarhúsinum í Fuglafirði um vikuskiftið. Seks bólkar fóru á pall og syrgdu fyri góðum undirhaldi og truplari uppgávu til dómararnar, tí sera hørð var kappingin. Bólkarnir vóru góðir og eisini sera ymiskir, men tveir skuldu víðari og soleiðis bleiv eisini**

PRIX FØROYAR 2005
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Jarðrok, fannakavi og kuldi. Solieðis vóru umstøðurnar uttanveggja leygarkvøldið. Men klokkan 21 var longu byrjað at kóka innanhýsis í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Seks bólkar vóru klárir at fara á pall, og hóast fólk ikki var komið júst í hópatali, tá fyrsti bólkurin, Side Effect, fór á pall, so var longu gott lag.

Seks góðir bólkar skuldu í harðari kapping royna at tryggja sær pláss í semifinaluni, sum verður hildin í Trongisvági, men bert tveir bólkar í hvørjum undanumfari koma víðari. So frammanundan er greitt, at bert tveir bólkar kunnu fara til hús, ella aðrastaðni, ovurhonds fegnir. Frammanundan var eitt sindur at práti um, hvør kanska var í uppskoti til at koma víðari, men sum kappingini leið, tagnaði alt tos um frammanundan kosin finaluevni.

### Effectfult

Side Effect var fyrsti bólkurin á pallinum. Klokan 21:15 rópti Jákup Magnussen, frásøgumaður, bólkin fram og hesin bólkurin, sum sigur seg spæla industriellan elektroniskan harðan rock leðgi fyri við orku og ídni. At salurin ikki var fullur av fólki tótist ikki at nerva bólkin. Har var power frá fyrstu løtu.

Ongin ivi um, at her eru menn, sum eru nakað fyri seg á føroyska rockpallinum. Tað er tøknin, sum í stóran mun er í hásæti, tó at teir eru sera fimir til bæði tøkni og ljóðføri. Teir duga óivað, sum fáur, at brúka tøknina og teldurnar, samplarar og annað. Tað hoyrdist. Og at fáa tað at ljóða sum tónleikur av slíkum slag skal ljóða. Lætt er annars at sampla og gera við, uttan at fáa tað í nakað veruligt høpi, kundi eg hugsað mær.

Men hvat ein so metir um úrvalið er kanska onnur søga og má standa til hvønn einstakan at gera av. Vit fingu í meldrinum bønarløtu frá Lindini og - um eg ikki fari skeivur - talu frá Hitler. Hetta saman við boðskapinum um, at ein heldur eigur at gera okkurt gott og munagott, heldur enn at tosa (prædika). Eg skilji meiningina og kann fylgja henni allan vegin. Men átti eg lagið, so hevði eg spælt tað heima, ikki almént. Tá hevði úrvalið í hvussu er verið eitt annað.

Men tað er so bert eina lagið og kanska smálutir, men óivað hevur onkur argast meira enn eg á hetta. Og kanska var júst tað meiningin?!.

Men rátt og gott. Og kynstrið at nýta alt tað teir eiga av nútímans tøkni duga teir í Side Effect. Og hattin ella kollin av fyri, at bert hálvfulli salurin ikki tóktist at nerva effektfullu framførsluna.

### Framúr sangrøddir

Síðani kom MMM á pallin. Tey siga seg spæla melodiøsan rock og tað passar. Bólkurin hevur andaligar tekstir og spælir góðan rock, kanska poppkent viðhvørt. Tey spæla væl og serliga kvinnurøddirnar hugtóku. Her eru sangarinnur, sum vit eiga at sleppa at hoyra oftari. Sera væl sungið og tvírøtt varð sungið ofta og riggaði tað væl.

Óivað eigur bólkurin í sínum løgum evni til fleiri landaplágur.

Tó at tey øll somul vóru fitt og vøkur at hyggja at á pallinum, so hendi lítið og onki á pallinum og so við og við gjørdist eitt sindur møðsamt. Eg veit, at ein ikki kann krevja, at popprockur við vøkrum tekstum leggur upp til villa framførslu. Men hinvegin kann okkurt henda. Tá t.d. dugnaligu sangarinnurnar hava staðið við 2-3 metra fjarstøðu og hugt í hvør sína ætt í 15-20 minuttir, tá er tað sum um, at ein vil hava okkurt at henda.

Men ein góð tónleikalig framførsla við góðum sangi og løgum. Ein framførsla, sum tó dalaði nakað móti endanum, men sum fekk fleiri at nikka samtykkjandi og endurhugsa sínar metingar um frammanundan mettar semifinaluluttakarar.

### Rókur og Regni

Alt fleiri fólk savnaðust í salinum. All That Rain kom á pall. Gamlir kenningar í prixhøpi. Manningin hevur verið skift nakað seinnu tíðina. Hans Ravsfjall hevur guitaran um hendi og Rókur Jákupsson Jacobsen syngur og leikar eisini guitar. Teir báðir "í botninum", bassurin og trummurnar, eru teir somu; Jens Tummas og Henning.